## Aftur tap til Ajax

Tað gongur framvegis ikki eftir vild hjá Ajax Keypmannahavn. Í kvøld taptu Heini Hanusarson og liðfelagarnir í Ajax 20-25 ímóti AaB Håndbold úr Aalborg á heimavølli í Bavnehøj-høllini í Keypmannahavn. Hálvleiksstøðan var 15-11 til AaB. Heini Hanusarson var tó eyðsýndur í dystinum. Hann skoraði fimm mál, og fekk eisini eina tveir minuttirs útvísing í dystinum. Men aftaná tríggjar dystir hava Heini Hanusarson og liðfelagarnir framvegis einki stig. Sunnudagin spælir Ajax á útivølli ímóti Bjerringbro.

## Villa og City úti av Carling Cup

Nú komið er til fjórða umfar av enska Carling Cup, má veitrast farvæl við fleiri Premier League feløg. Kvøldsins stóra merkisverda úrslit framdi Brighton, sum sló Manchester City úr kappingini. Felagið, sum til dagligt leikar í triðbestu deildini, hevði á heimavølli fingið úrslitið 1-1 við sær, áðrenn farast mátti í longda leiktíð. Her kom Brighton fyrst á odda, men Stephen Ireland sendi liðini út í brotsparkskapping, tá ið hann javnaði til 2-2. Í brotsparkskappingini var Brighton omaná, og verjuleikarin Michael Ball gjørdist syndabukkurin hjá Manchester City, eftir at hann, sum einasti leikari, hevði misnýtt sítt brotsspark. Eisini Aston Villa mátti lúta fyri liði úr lægri deild. Aston Villa, sum hevði nógvar eykaleikarar í uppstillingini, tapti 0-1 fyri Queens Park Rangers úr næstbestu deildini. Damion Stewart skoraði einliga málið tá ið 57 minuttir vóru leiktir.

# Eysturríkar koma mannsterkir

**Á leið 200 atgongumerki eru longu send til Eysturríkis, har áhugin fyri landsdystinum ímóti Føroyum er heilt stórur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast talan var um stóra eyðmýking, so skapti føroyski sigurin í Eysturríki eisini eina veruliga fascinatión fyri føroyskum fótbólti í Eysturríki*

12. september 1990 er eins minniligur í Eysturríki, sum dagurin er tað í Føroyum.

Hóast talan uttan nakran sum helst iva var um størstu eyðmýking, sum Eysturríki hevur verið fyri sum fótbóltstjóð, so skerst ikki burtur, at føroyska avrikið í Landskrona eisini fascineraði nógv í Eysturríki. Og í øllum førum syrgdi tað fyri, at Føroyar fyri ævir eru prentaðar á nethinnuna hjá lokalu fótbóltsfjepparunum.

Nú 18 ár seinni stendur Eysturríki fyri løtuni, har ósigurin skal hevnast, og verður hetta á Tórsvølli tann 11. oktober. Og áhugin úr Eysturríki fyri dystinum er eisini heilt stórur. Eysturríkar hava kanska ikki somu siðvenju í landsliðsstuðuli, sum eitt nú skotar hava, men av FSF-skrivstovuni verður sagt, at eini 200 atgongumerki longu eru seld til Eysturríkis.

Hinvegin hevur føroyski áhugin enn ikki verið serliga stórur. Enn eru tó hálv triðja vika til dystin, og føroyingum so líkt, so verður ofta bíðað til í seinastu løtu við at keypa atgongumerki til dystin.

## Hvirlan og Stuttleikir á Frælsinum

Hvirlan, sum er felag fyri frælsan ítrótti, skipar annan leygardag fyri Stuttleikum á lærara-skúlavøllinum á Frælsinum í Havn.

Stuttleikir byrja leygardagin, 4. oktober. klokkan 12 og koyra til klokkan 14. Tilmelding fer fram á staðnum frá klokkan 11.30.

Leikirnir eru skipaðir sum tríkampur, har hvør íðkari luttekur í bóltkasti, longdarlopi og 60 m renning. Tíðir og longdir verða skrásettar á skreytblað, sum íðkarin fær til tilmeldingina. Tá hann hevur luttikið í øllum trimum greinum, fær hann heiðursmerki fyri hetta. Alla tíðina, so leingi leikirnir vara, kunnu luttakararnir stilla seg í rekkju og vera við, men bert tríggjar ferðir verða tíðir og longdir skrásettar á skreytblaðið. Til ber eisini bara at fáast við eina grein, men luttøka í øllum trimum er kravd, skal ein gera sær vón um heiðursmerki. Til tess at børnini ikki skulu ørkymlast meir enn neyðugt, er gott hjá teimum at hava ein vaksnan við sær, soleiðis at tey finna fram til røttu rekkjurnar og fáa neyðugu skrásetingarnar á skreytblaðið.

Luttøkugjaldið er 50 krónur, sum fólk skulu hava í reiðum peningi, - og ongantíð betur, um tey koma við „akkurát fyri“, so avgreiðslan verður skjót. Vónandi taka fólk undir við tiltakinum og bera boðini á mannamuni, tí vit vilja gjarna, at tað er svart av fólki henda dagin á Frælsinum.

# Newcastle vil hava Venables

**Eftir øllum at døma verður tað Terry Venables, sum skal taka yvir í Newcastle, sum enn eina ferð liggur í botni við kreppu á síðulinjuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Krøvini og vónirnar til ein venjara í Newcastle eru altíð stór. Men tað er kortini rættiliga sjáldan, at nakar av venjarunum veruliga hevur livað upp til stóru vónirnar. Eisini hóast leiðslan í felagnum ikki hevur verið pírin við pengum til spælarakeyp.

Eftir at Kevin Keegan herfyri fór frá sum venjari hjá felagnum, hevur nógv verið gitt um, hvør nýggi maðurin í sessinum verður.

Eitt skifti tóktist fyrrverandi skarrættarin, Alan Shearer, at vera besta boðið, men nú verður váttað, at felagið er í samráðingum við Terry Venables.

Og Venables er ikki hvør sum helst í enskum fótbólti. Hann ikki hevur kanska verið heilt so aktivur, síðani hann í 1996 leiddi Ongland til fjórðingsfinaluna í EM-kappingini, og síðani leiddi australska landsliðið í tvey ár. Men hann hevur verið brúktur sum kreppuloysn hjá Crystal Palace, Middlesbrough og Leeds United, umframt at hann var partur av venjaratoyminum kring Steve McLaren, tá hesin var landsliðsvenjari. Og hann var eisini millum evnini, tá Newcastle fyri fýra árum síðani skuldi finna avloysaran fyri Bobby Robson.

Sambært enskum miðlum, so váttar Venables, at hann og Newcastle í gjár tosaðu saman, og at partarnir aftur hittast í dag.

Hvussu er og ikki, so er eingin ivi um, at fótbóltshýrurin í Newcastle er heilt í botni í løtuni. Í gjárkvøldið tapti Newcastle 2-1 á heimavølli móti Tottenham í Carling Cup, og her vóru bara 20.577 áskoðarar. Hetta er lægsta áskoðaratalið, síðani St. James's Park varð víðkað til at taka fleiri enn 52.000 áskoðarar.



*Alt bendir nú á, at Terry Venables verður maðurin, sum skal royna at fáa Newcastle-skútuna úr verandi brotasjógvum*
*Mynd: Polfoto/AP*